



*– Myndatólið hevur ikki, sum vit menniskju, gjørt av frammanundan, hvussu ein stari plagar at síggja út, sigur Ole Wich, sum við grafisku myndarøðini "Stæreblind" vísir okkum staran, sum vit ongantíð hava sæð hann fyrr*

langt burtur frá sínum nærumhvørvi. Her er týðiliga talan um eitt umhvørvi, sum bæði mentalt og ítøkiliga er bundið at og av fiskanótini. Sjónarringurin er trongur, tó ikki trengri enn at framtíðin hómast í bláligu strálunum kring káma tunnilsmunnan og vantandi høgru síðurammu, sum leiðir inn í næstu mynd. Her er eisini hol komið á nótina og í staðin lýsir tunnilsmunnin nú upp í myndini sum ein ovurbjørt sól. Í holinum daga upp møguleikarnir og framtíðin, sum á triðju myndini hava fingið skap av einum globus. Nótin er ikki longur gjørd úr tráði, men er teknað kámt á myndina. Hennara leiklutur er minkaður í takt við, at ein onnur nót hevur tikið yvir, alnótin í skapi av eini ørgrynnu av leidningalíknandi tráðum, sum halda heiminum saman. Ella Klaksvík sum part av algerðini, tí samstundis ímyndar kollagan búmerkið hjá Klaksvík.

## Modernaðar tíðir

Verkið "Frá nót til alnót" er gjørt til júst hesa framsýningina í Leikalund í Klaksvík. Nú hann skuldi sýna fram í Klaksvík, helt Ole Wich tað vera eyðsæð at royna seg við einum verki, sum á onkran hátt ímyndar tað, sum so leingi mest sum hevur fylt alt í hugaheiminum hjá norðoyingum

– Tankin um fasta sambandið er jú bæði ræðandi og ómetaliga spennandi, so tað sigur seg sjálvt, at hann fyllir nógv. Sum stemningurin er beint nú, sært tú næstan fyri tær, hvussu flestu norðoyingar fara at hoppa og dansa í ovurkæti tann dagin, tunnilin letur upp. Men hvat so, tá ein tíð er frá liðin, og norðoyingar ikki longur eru "vardir" frá umheiminum? Fer holið tá at kennast sum ein hóttan ella fara fólk at duga at brúka nýggju møguleikarnar?, hugleiðir Ole Wich, sum ógvuliga hóskandi hevur hongt "Frá nót til alnót" upp við síðuna av lítlu kollaguni "Modern Times", har ein modernað reyð plastikk klemma hevur kroyst seg um høvdið á eini gamaldags træklemmu. Tað er so ein máti at ímynda sær modernaðu tíðirnar - men reyðar plastikk klemmir kunnu jú, sum kunnugt, brúkast til so mangt. Tað veldst um eyguni, ið síggja ...

Framsýningin hjá Ole Wich í Leikalund verður at síggja allan februar mánað.

